

*Løgtingslimir úr fleiri flokkum vilja nú hava Løgtingið at staðfesta, at tað eru tryggingartakararnir sjálvir, sum eiga Føroya Lívstrygging og at hon tískil ikki longur skal vera eitt alment partafelag*

# Stríð um eina milliard endar nú í Løgtinginum

**– Løgtingslimir úr ymsum flokkum halda, at Løgtingið gjørdi eitt mistak, tá ið tað í 1999 gjørdi Føroya Lívstrygging til eitt alment partafelag og tað mistakið vilja teir nú rætta**

OGNARRÆTTUR
*Áki Bertholdsen*

- Tá ið Løgtingið í 1999 gjørdi Føroya Lívstrygging til eitt alment partafelag, var tað eitt mistak. Løgtingið átti nevniliga onki í Føroya Lívstrygging og hevði tískil heldur ikki rætt til at leggja seg út í eigaraviðurskiftini. Sostatt var talan um ognartøku.

Tað halda løgtingslimir úr fleiri flokkum.

Ein av fyrstu døgunum fara teir tískil at leggja uppskot fyri tingið um at fáa hesa avgerðina broytta.

Tað eru løgtingslimir úr javnaðarflokkinum, sambandsflokkinum, miðflokkinum og kanska eisini tjóðveldisflokkinum, sum fara at leggja uppskotið fram.

Hinvegin hava fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin boðað stigtakarunum frá, at teir verða ikki við til at leggja uppskotið fram.

– Ætlanin er at fáa Løgtingið at samtykkja at heita á Landsstýrismannin í vinnumálum um at leggja uppskot fyri Løgtingið, har Føroya Lívstrygging við lóg verður umskipað til ein sjálveigandi stovn, har tryggingartakararnir hava fulla ávirkan og innlit, ella sum eitt sínámillum felag, har tryggingartakararnir hava ognarrættin og harvið eisini fulla ávirkan og innlit.,

Lagt verður upp til, at lógaruppskotið skal fáa gildið frá 1. juli 2002.

### Ivi sáddur um ognarviðurskiftini

Ein av stigtakarunum, Hans Pauli Strøm, sigur, at tá ið Løgtingið umskipaði Føroya Lívstrygging til eitt alment partafelag til eitt alment partafelag beint fyri jól í 1999, var tað stór misnøgd við ætlanina.

– Tíðin var knøpp. Uppskotið um at gera Føroya Lívstrygging til alment partafelag varð lagt fyri tingið í desember og tað skuldi vera avgreitt fyri jól, tí tað skuldi setast í gildið longu 1. januar, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur, at viðgerðin varð hareftir, men uppskotið varð samtykt.

– Men longu tá varð ivi varð sáddur, hvør ið yvirhøvur átti Føroya Lívstrygg ing.

Hann sigur, at tryggingin varð stovnað í 1965 og tá stóð í skjølunum frá lógar deild Løgtingsins, at talan var um ein sjálvsognarstovn.

– Tá ið Lívstryggingin hevur teknað tryggingar, hevur hon eisini ført fram, at tað vóru tryggingartak ararnir sjálvir, sum áttu tryggingina.

– Spurningurin er tí, sum Løgtingið yvirhøvur hevði heimild at gera Lívstryggingina til eitt alment parta felag, tí er talan um ein sjálvsognarstovn, er talan um ognirnar hjá øðrum og tað kann Løgtingið ikki taka sær ræðið á.

– Løgtingsmaðurin sigur, at tá ið Lívstryggingin varð gjørd til alement partafelag, setti landið 500.000 krónur í felagið.

– Fyri hesa hálvu milliónina hevur Løgtingið sostatt tikið sær ræði á øllum tí uppsparda peninginum í tryggingini, sum táttar í eina milliard.

### Nýggj skjøl undan kavi

Hans Pauli Strøm sigur, at tey allarflestu, sum hava teknað trygging, eru limir í fakfeløgunum og tey mótmæltu, at Lívstryggingin varð gjørd til alment partafelag.

Men beint eftir, at Løgtingið hevur samtykt, at Lívstryggingin skal vera alment partafelag, kemur eitt skjal undan kavi, sum ongantíð kom Løgtinginum í hendi, tá ið uppskotið varð viðgjørt.

– Hetta er eitt skjal, sum stjórin fyri Lívstryggingina og sakførari hennara, skrivaðu longu í 1997 og har verður staðfest, at ongin ivi er um, at tryggingin er ein sjálvsognarstovnur. Tvs, at tað eru tryggingartakararnir sjálvir, sum eiga tryggingina og ikki Løgtingið ella landsstýrið.

Hann sigur, at hevði Løgtingið vitað um innihaldið í hesum skjali, hevði tað neyvan tikið tað avgerð sum tað tók um at gera tryggingina til eitt alment partafelag.

– Sum umboð fyri nógv tann størsta partin av tryggingartakarunum, royna fakfeløgini síðani at fáa avtalu í lag við Landsstýrið um at lata tryggingartakararnir fáa tað ávirkan á tryggingina, sum teir eiga.

– Tað eydnaðist ikki og tí ætlaðu fakfeløgini at stevna landsstýrinum.

Hans Pauli Strøm sigur, at politikarar úr nøkrum flokkum fara tí at royna at loysa málið politiskt fyri at sleppa undan stevning og tí er uppskotið lagt fyri tingið.

Hann sigur, at verður uppskotið ikki samtykt, er ongin ivi um, at fakfeløgini fara at stevna landsstýrinum.

Hann sigur, at málið hevur rættiliga stóran, prinsipiellan týdning.

– Samansparingin í Lívstryggingini táttar í eina heila milliard. Av hesum meta fakfeløgini, at teirra limir eiga eini 80%, ella 800 milliónir og tað eru hesar upphæddir, sum tryggingartakararnir vilja hava ávirkan á.



# NSÍ fingið nýtt neyst

*Nýggja neystið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ varð leygardagin tikið í nýtslu. Pláss er fyri fimm bátum í neðra, og stórur salur er í erva*
*Mynd: Álvur Haraldsen*





*Nógv fólk var komið saman til hátíðarhaldið. Leygarkvøldið vóru eini 200 fólk savnað í neystinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Leygardagin varð nýggja neystið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ alment tikið í nýtslu. Pláss er fyri fimm bátum í neðra, og stórur salur er í erva**

KAPPRÓÐUR
*Stefan í Skorini*

– Tað er fyri at geva ítróttarfólki okkara betri umstøður, at vit hava bygt hetta nýggja neystið, sigur Sunvard Vang, nevndarlimur í Kappróðrarfelagnum NSÍ, nú nýggja neystið varð tikið í nýtslu leygardagin.

Limirnir í felagnum eru ógvuliga fegnir um at hava fingið eitt ordiligt neyst til bátarnar og eini felagshøli, har tey kunnu hava samveru eftir venjingar.

Kappróðrarfelagið NSÍ hevur í dag fimm bátar, og í fjør vóru seks manningar knýttar at felagnum. Hetta er tí eitt stórt og virkið felag, ið hevur sett dám á føroyskan kappróður seinastu árini.

Pláss er fyri fimm bátum í neðra, og harumframt eru umklæðingarrúm og brúsurúm í kjallaranum. Í erva er stórur salur, ið kann nýtast til alskyns endamál.

Sunvard Vang væntar, at hesin salurin kann geva eitt fitt ískoyti til raksturin av felagnum og nýggja bygninginum.

Leygarkvøldið var stór veitsla í salinum, og tá varð borðreitt fyri umleið 200 fólkum. Hesin salurin er tí væl egnaður til brúdleyp og onnur stór tiltøk.

### Fleiri nýggjar bátar

Kappróðrarfelagið NSÍ hevur í dag fimm bátar. Tríggir teirra eru heilt nýggir. 10-mannafarið Eysturoyingur varð bygdur fyri 4 árum síðani. 5-mannafarið Tjaldrið og 6-mannafarið Sølmundur eru enn nýggjari enn 10-mannafarið.

Síðani er tað 8-mannafarið Heiðabáturin, ið er gamli Skopuningurin, sum róðrarfelagið keypti frá skopuningum. 5-mannafarið Spógvin varð bygdur í 1961, og var hann tann fyrsti báturin hjá felagnum.

Sunvard Vang sigur, at felagið enn ikki hevur mannað allar bátarnar til komandi kappingarár. Onkur av bátunum er so gamal, at tað er torført at fáa manningar at bjóða seg fram.

### Góðan stuðul

Sunvard Vang sigur, at felagið hevur fingið sera góðan stuðul frá vinnulívinum og fyritøkum á Skálafjørðinum til byggingina av nýggja neystinum. Uttan hesa fíggjarligu hjálpina hevði verið torført at farið undir byggingina.

Umframt henda privata stuðulin hevur felagið eisini fingið 30% av kostnaðinum úr landskassanum.

Byrjað varð at byggja neystið í 1998, og árið eftir kundu bátarnir standa undir taki í neystinum. Nú eru tó allir snøklar gjørdir. Tað mesta av arbeiðinum hevur verið sjálvboðið, og tí hevur tað eydnast at halda ein lágan kostnað. Neystið hevur kostað einar tvær milliónir krónur.

Leygardagin var eisini ein uppboðssøla, har málningar hjá lokalum politikarum vórðu seldir. Kappróðrarfelagið fekk einar 80.000 krónur frá hesum tiltakinum.

Nú eru karmarnir kring virksemið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ avbera góðir, og runavíkingar vóna sjálvandi, at hetta fer at síggjast aftur í úrslitunum í ár.

Í fjør fekk felagið eitt FM-heiti. Tað vóru dreingirnir á Tjaldrinum, ið gjørdust vinnarar. Harumframt fingu menninir á Sølmundi silvur.



*Tórbjørn Jacobsen seldi ein málning á uppboðssølu. Fleiri málningar vóru til sølu, og uppboðssølan gav 80.000 krónur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Húsini úti í Bakka:

# Rættarmálið verður drúgt

**Rættarmálið um tey kendu sethúsini úti á Bakka er byrjað. Landsstýrið og býráðið vilja hava eigaran av húsunum at viðurkenna fútabannið, sum er sett ímóti byggingini. Dómarin segði týsdagin tann fyrsta úrskurðin, sum hevur við sær, at málið heldur fram, og at enn fleiri rættarfundir vera**

BYGGIMÁL
*Stefan í Skorini*

Føroya Rættur er farin undir at viðgera rættarmálið millum Tórshavnar Býráð og Føroya Landsstýrið øðrumegin og Jóhan Mac Donald hinumegin.

Býráðið gav manninum loyvi at byggja eini sethús á eini neystatekju úti í Bakka, sum er úti á Reyni í Havn. Leigusáttmáli varð undirskrivaður og farið varð undir at byggja húsini.

Men so senda tríggir grannar eina kæru til Landsstýrið, har víst verður á, at byggingin er í stríð við byggisamtyktina fyri økið. Kæran er undirskrivað at Ólavi Ellefsen, Jonhardi Eliasen og Elin Holm.

Landsstýrið gevur teimum viðhald, og gevur býráðnum boð um, at byggingin ikki kann halda fram, uttan at byggisamtyktin verður broytt samstundis.

Meirilutin í býráðnum metir tó, at talan bert er um eitt smávegis frávík frá byggisamtyktini, og tí var ikki neyðugt at broyta alla samtyktina fyri økið, og tí fær maðurin loyvi at halda fram.

Hesum sjónarmiði tekur Landsstýrið ikki undir við og áleggur tí býráðnum at steðga byggingini alt fyri eitt.

Maðurin, ið byggir húsini, metir seg tó ikki hava gjørt nakað skeivt í hesum málinum, og hann heldur tí fram at byggja. Býráðið sendir síðani málið í Fútarættin, ið setir fútabann ímóti byggingini.

Síðani hava Landsstýrið og Tórshavnar Býráð stevnt Jóhan Mac Donald, har tey krevja, at maðurin viðurkennir bannið.

Halgir Winther Poulsen, ið er advokatur hjá manninum, krevur fríkenning, tí hann ikki hevur forbrotið seg á nakran hátt. Hann fílist á, at maðurin onga upplýsing hevur fingið hvørki frá býráði ella landsstýri. Hann hevur einki bræv ella kunning fingið um málið, og harvið hevur umsitingin brotið fleiri reglur. Vegna hesi brot skuldi maðurin so fríkennast.

### Fyrsti úrskurðurin

Dómarin, Henrik Møller, segði týsdagin fyrsta úrskurðin í málinum. Hann var, at Jóhan Mac Donald ikki kann fríkennast vegna formell mistøk hjá umsitingini í Landsstýrinum. Dómarin metti eisini, at Landsstýrið hevur heimild at taka slíkar avgerðir, sum tað gjørdi í hesum førinum.

Tó leggur dómarin dent á, at rætturin enn ikki hevur tikið støðu til, um henda umsitingarliga avgerðin hjá Landsstýrinum er røtt og eigur at standa við. Hetta verður tikið uppaftur seinni.

Stríðið um sethúsini úti í Bakka heldur nú fram í rættinum. Væntandi verður hetta eitt drúgt og umfatandi rættarmál.